Fróðskaparsetur Føroya

5. oktober 2004

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 11/2004

Tíð: Mánadagin 4. oktober 2004, kl. 13.00-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari
Jákup Sørensen, fulltrúi (við til pkt. 4)

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 10/2004 setursráðsfundi 2. september 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarmál:**
   a. **Endurskoðan av býti á fíggjarjáttan 2004.** (J.nr. 0015-001111).*Fundarskjal: Uppskot til býti 15 s.* AS gjøgnumgekk tølini, sum eru komin inn. Allar deildir rokna við minni nýtslu til leysalærarar og próvdøming enn upprunaliga mett. Samtykt at seta nakað av avlopinum av til KT-útgerð til felags økið, restin verður býtt eftir vanliga býtislyklinum. Setursskrivstovan sendir nýtt býti út til deildirnar.

   b. **Fíggjarlógaruppskotið 2005.** (J.nr. 0015-01365). Í uppskotinum til FL 2005 eru 19.070 tkr settar av til raksturin av Fróðskaparsetrinum. Hetta eru umleið 500 tkr meira enn í 2004. Av tí at vit hava fallandi inntøkur, er nettovøksturin umleið 200 tkr. Hetta strekkir ikki til ætlaða virksemið. Deildirnar verða bidnar um alt fyri eitt at endurskoða konturnar til leysalærarar, próvdøming og ferðing til tess at finna møguligar sparingar.

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

4. **Kunningarpolitikkur á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. 0018-01217). Uppafturtøka frá fundi í november 2003. MM tók aftur í kjakið frá seinasta fundi. Uppskot til endamálsorðing samtykt:
*Endamálið við kunningini á Fróðskaparsetri Føroya er at lýsa virksemið og skapa áhuga fyri og gagnnýtslu av granskingarúrslitum millum almenni, politikarar, vinnulív, feløg og stovnar og fjølmiðlar. Og at knýta bond við verandi og komandi studentar, starvsfólk, samstarvsfelagar og sponsorar til undirvísing og gransking.*
Kjakast varð um kunning yvirhøvur og hvørji tiltøk dentur eigur at leggjast á. Almennu fyrilestrarnir eru ein týdningarmikil partur av kunningini og profileringini av Fróðskaparsetrinum. Tíðindaskriv og dagføring av heimasíðuni verða eisini raðfest høgt. Eiga at luttaka í Mentanarnáttini næstu ferð. Deildirnar ynsktu at meira uppsøkjandi arbeiði verður gjørt fyri at samla saman tíðindir at kunngera. Uppskotið frá JS um at hann kemur á kaffifund á deildunum uppá skift 3. hvørja viku samtykt. Øll starvsfólk eiga hava kunningina í huga og at boða JS frá í sambandi við útgávur, tiltøk o.l. sum setursfólk taka lut í og sum setrið eigur at kunna um.

5. **Áheitan frá Università della Calabria, Italia um samstarv.** (J.nr. 0012-01406). Fundarskjal: Uppskot til Letter of Intent. 2 s. MM greiddi frá. Setursráðið tók undir við eini styttari útgávu av eini samstarvsyvirlýsing.

6. **Valreglur fyri Fróðskaparsetur Føroya.** (J.nr. 0010-00511). Ivamál hava stungið seg upp í sambandi við valið, sum er í gongd í løtuni, hvørt adjungeraðu starvsfólkini hoyra heima í valbólki I ella II. Semja um at málið er prinsipielt og tískil eigur at vera viðgjørt á deildunum, áðrenn setursráðið tekur støðu. SSS sendir eitt broytingaruppskot til deildirnar til støðutakan. Møguligar broytingar koma í gildi eftir rektaravalið í heyst.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 10.9.04 og 30.9.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 23.9.04.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 28.9.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

8. **Ársroknskapir 2003. Grannskoðanarfrágreiðing fyri *Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovnur* góðkend og undirskrivað millum funda og ársroknskapur fyri *Grunn Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* góðkendur og undirskrivaður millum funda. At staðfesta.** (J.nr. 0016-01426 og 0016-01427). Staðfest.

9. **Opnar dyr á Fróðskaparsetrinum. Tiltakið, sum var ætlað at vera 1. oktober, er avlýst. Avgerðin er tikin millum funda. At staðfesta.** (J.nr. 0018-01254). Staðfest.

10. **Mannagongd fyri starvssetan. At staðfesta.** (J.nr. 0020-01342). Staðfest.

11. **Setan av telduvørði. Setursráðið hevur millum funda tikið undir við tilmælinum frá setanarnevndini um at seta Jógvan K. Poulsen í starv sum telduvørður. Hann byrjar 1. november. At staðfesta.** (J.nr. 0021-00945 og 0023-01440). Staðfest.

12. **Góðskrivingar. Føroyamálsdeildin mælir til, at Annika Olsen fær hesar royndir, sum hon hevur tikið við Odense Universitet, góðskrivaðar á exam.art.-lestrinum soleiðis:**
    - **"Litterær metode og analyse" (15 ECTS) fyri *Greining* (12 ECTS)**
    - **"Den ældre teksthistorie" (15 ECTS) fyri *Bókmentasøgu I* (10 ECTS)**
    - **"Den nyere teksthistorie" (18 ECTS) fyri part av *Bókmentasøgu II* (10 ECTS) soleiðis, at studenturin fer til roynd við skerdum lestrarlista, sum inniheldur føroyskar bókmentir frá tíðarskeiðnum 1870-2000, og har eisini íslendskar bókmentir eru umboðaðar**
    - **"Sproglig metode og analyse" (15 ECTS) fyri *Ljóðfrøði* (4 ECTS), part av *Málsøgu* (16 ECTS) og part av *Mállæru* (16 ECTS) soleiðis, at studenturin fer til roynd við skerdum lestrarlista (føroyski parturin vantar)**
    - **"Sprog og kommunikation" (18 ECTS) fyri *Samskifti* (8 ECTS)**
    - **"Historiske romaner og fortællinger" (12,9 ECTS) fyri *Ritverk* (4 ECTS)**
    - **"Norsk litteratur og sprog" (6 ECTS) og "Svensk litteratur og sprog" (6 ECTS) fyri *norskt* og *svenskt* í *Málsøgu* (16 ECTS).** (J.nr. 0046-01437).

    Staðfest.

**Kunningarmál:**

13. **Val til megindeildarráðini verður týsdagin 5. oktober 2004, valt verður á Setursskrivstovuni millum kl. 10.00-15.00. Freistin at boða frá valevnum er 1. oktober 2004 kl. 15.** (J.nr. 0011-01379).

14. **Kirsten Brix hevur sagt seg úr starvi sum adjungeraður lektari á Føroyamálsdeildini, galdandi frá 1. september 2004.** (J.nr. 0022-00105).

15. **Mánaðarjavni ultimo august 2004, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 11.148.900 kr = 60,1% av játtanarkarmi uppá 18.558.000 kr.** (J.nr. 0015-01111).

16. **Frágreiðing frá Føroyamálsdeildini frá fyrsta altjóða summarskeiði í føroyskum máli, bókmentum og mentan á Fróðskaparsetrinum 5.-27. juli 2004.** (J.nr. 0040-01194).

17. **Frá námsferðarstuðulsmóttakarum:**
    a. **Frágreiðing frá Wlodzimierz Olszaniec, Warsawa, frá námsferð í Føroyum 23.8.-5.9.04.** (J.nr. 0071-01126).
    b. **Ewa Witon: "Holocene Marine and Freshwater Diatoms from the Faeroe Islands. Taxonomy and Environmental Influences", Earth Sciences Centre, Göteborg Universitet 2004. Hon fekk stuðul í fjør.** (J.nr. 0071-00917).

18. **IAUP (International Association of University Presidents) ráðstevna í Bangkok og Pattaya 10.-15.7.05 "The Challenge of Globalization and the Role of Higher Education".** (J.nr. 0057-00155).

**19. Faldari Føroya Landsbókasavn um E-tilfeingi Vísindaligir leitigrunnar og e-tíðarrit.**

**20. Grein í Magisterbladet 14/04 "Forskningsformidling. Forskning skal være folkelig".** Avrit latið setursráslimunum.

Frágreiðing: Annika Sølvará